# SJÓNLEIKURIN BJARGAÐI MÆR FRÁ SJÁLVMORÐI

EIN LEMJANDI **DEPRESSIÓN** KOM FYRI HÁLVUM ØÐRUM ÁRI SÍÐAN SO LANGT ÚT, AT **HJÁLMAR DAM**, SJÓNLEIKARI, SÁ **SJÁLVMORÐ** SUM EINASTA ÚTVEG. MEN **SJÓNLEIKURIN** GJØRDIST BJARGINGIN.




VANGAMYND
Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


– Hetta forbannaða lívið hevur einki endamál. Helvitis lort.

Sjónleikarin Hjálmar Dam situr og mutlar fyri seg sjálvan. Einsamallur inni í sínum lítla kamari. Hann hevur stíva kenning. Gremur seg um sítt forbannaða lív. Fjálturstungin hyggur hann at akvavit-fløskuni, sum skjótt er tóm. Trýstir ballstubban í øskubikarið. Jú, hann skal hava ein afturat. Hann kulkar tað seinasta í einum. Soleiðis. Aftur í dag hevur hann gjørt enda á einari brennivínsfløsku. Hann roynir spakuliga at koma á føtur. Má finna fótafestið. Og so skinklandi inn í sovikamarið.

## Funnin ov lættur

– Eg var mitt í fúlari depressión. Men tíbetur útsetti eg deyðan.

Hjálmar Dam, sjónleikari, festir sær í eitt ball, steðgar á og letur roykin blanda seg við orðini, sum hanga í luftini. Tað angar av nýgjørdum kaffi úr koppinum. Vit sita í Sjónleikarahúsinum í Havn, har havnarmaðurin álvarsamur greiður frá.

30 ára gamli Hjálmar Dam er í løtuni ein av bjartastu stjørnunum á føroyska sjónleikapallinum. Púra óroyndur trein hann fyri fyrstu ferð á pall 24 ára gamal, og síðan hevur hann bergtikið áskoðarafjøldir við leikum sum Kardamummubýurin, Verkætlan Laramie, Klintrimús og Tornarósa. Men aftan fyri stóru succes'ina, situr ein havnarmaður, sum fyri bara hálvum øðrum ári síðan var fullkomiliga í sorli sálarliga. Tankarnir um at gera enda á sær sjálvum vóru honum sera nær. Men áhaldandi uppgávur frá sjónleikinum hildu honum á lívi.



*Sjónleikarin Hjálmar Dam var fyri hálvum øðrum ári síðan mitt í fúlari depressión. Men sjónleikurin bjargaði honum*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

Í 2008 ætlaði Hjálmar at flyta til Danmarkar. Hann hevði søkt inn á sjónleikaraskúla og droymdi um eina lukkuliga tilveru á flatlondum, har hann slapp at royna seg í dreymastarvinum sum sjónleikari. Í upptøkuroyndini skuldi Hjálmar spæla eitt brot úr kærleikssleikinum Romeo & Julie. Men tað gekk snøgt sagt av skriðuni. Hann hevði hjartasorg og var alt annað enn romantiskur, tá hann sýndi fram fyri dómarunum. Ikki óvæntað varð hann vigaður og funnin ov lættur. Alt var farið í sor.

Hann var ikki meira enn komin aftur til Føroya, tá hann fór at drekka illa. Vanliga eina fløsku hvørt kvøld. Í seks samfullar mánaðir. Akvavit og gin.

– Eg sá einki endamál og livdi í svartasta vónloysi. Eg visti væl, at tað var heilt ótrúliga vánaligt, ræðuliga egoistiskt og ómetaliga feikt at geva upp. Men tá tú er í støðuni, hugsar tú ikki um tað. Tú vil bara sleppa burtur, sigur Hjálmar.

## Sjálvmorð hvørt kvøld

Sjónleikurin vísti seg at gerast bjargingin. Hann fekk aftur og aftur bjóðað leiklutir í ymsum leikum. Soleiðis flutti hann seg spakuliga frá brennivíninum og tunglyndinum.

– Tá John Rimsted ringdi til mín um sína verkætlan við Karrybollunum, stúrdi hann fyri íløguni í filmin. Hvat nú, um onkur doyði, spurdi hann. Eg segði honum, at tað skuldi hann ikki hugsa um. Eg havi ongantíð runnið frá mínum uppgávum, og soleiðis útsetti eg deyðan so hvørt.

Hjálmar Dam fortaldi fáum um sínar trupulleikar. Merktur av tunglyndi fór hann í september í fjør undir at seta upp leikin 4:48 Psykosa, sum viðgjørdi evnið sjálvmorð.

Í høvuðsleiklutinum sum sjúklingurin royndi Gunnvá Zachariasen at draga áskoðaran inn í støðuna, tá fólk eru á deyðastrá. Hjálmar spældi lækni hjá sjúklinginum.

– Tað var ræðuligt. Kvøld eftir kvøld skuldi eg spæla persónurin, sum vantaði í mínum lívi. Tað sleit sinnið at síggja Gunnvá Zachariasen skrála um helviti á jørð og sjálvmorð. Men tað høvdu hon ella hini ikki hóming av. Tey vistu av ongum. Eg hugsaði ofta um at rýma. Men tá var tað fantastiskt at koma heim til Hannu, mína lívsglaðu, positivu og elskaðu gentu, sigur Hjálmar.

## Ongan samleika

Sum sjálvlærdur sjónleikari hevur Hjálmar Dam krógvað seg fyri fjøldini í fleiri leiklutum. Tá hann verður biðin um at lýsa seg sjálvan, hevur hann ilt við at svara. Hann hvørvur inn í sínar egnu tankar og fer leitandi at greiða frá.

– Satt at siga, so veit eg ikki. Eg havi ongan identitet. Eg dugi ikki at siga tær, hvør maðurin, sum eg síggi í speglinum hvønn morgun, er. Men eg veit, at eg livi gjøgnum eyguni á øðrum og verði firtin, um tey definera meg skeivt. Eg dugi ikki at taka móti beinleiðis røðu. Tí hvørvi eg oftast, tá takkarrøður og slíkt er á skránni. Hinvegin verði eg glaður, tá eg hoyri umvegis míni næstu, at eg havi staðið meg væl. Eg vil fegin vera